# Rætt at føra protokoll

**Edmund Joensen, løgtingsformaður, heldur tað vera rætt at skráseta, hvussu tingfólk møta upp til fundirnar. Men hann heldur, at farloyvisskipanin hjá tingfólki er í so stirvin**

LØGTINGIÐ
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*




*Tá broytingar í tingskipanini verða viðgjørdar næstur ferð, verður farloyvisskipanin hjá tingfólk millum eitt av broytingaruppskotunum. Tingfólk kunnu ikki hava farloyvi styttri enn 10 dagar, og tað er ov stirvið, heldur Edmund Joensen, løgtingsformaður*

Eg haldi ikki, at uppmøtingin tingfólki hevur verið verri, enn hon plagar at vera, sigur Edmund Joensen, løgtingsformaður í viðmerking til tað, vit í gjár skrivaðu um uppmøtingina hjá tingfólki.

Av teimum 50 fundunum, sum løgtingið hevur havt síðani tingsetan byrjaði á ólavsøku, hava tingfólk 105 ferðir verið burtur. Tað merkir, at tvey tingfólk vanta á hvørjum tingfundi.

Men løgtingsformaðurin heldur, at tað er neyðugt at føra protokoll, og at tað verður skrásett, hvussu tingfólk møta upp

Tað er rættast, at slíkt verður skrásett – og tað ger einki, um almenningurin sær hetta, heldur Edmund Joensen.

Løgtingsformaðurin heldur kortini, at skipanin við farloyvi er í so stirvin. Tingfólk mugu verða burtur frá tingarbeiðinum í í minsta lagi 10 dagar, tá tey biða um farloyvi. Hetta er í so leingi, heldur Edmund Joensen. Hann sigur, at hetta verður tikið við, tá broytingar í tingskipanini koma til umrøðu. Men hann sigur, at orsøkin til, at ein slík freist varð sett, var at byrja fyri, at varafólk bara vórðu tikin inn fyri at atkvøða. Men harfrá og til at verða burtur í 10 dagar, heldur hann vera í so nógv.

Tingfólk kunnu fáa farloyvi við løn ella farloyvi uttan løn. Við løn fáa tey farloyvi, um tey eru í almennum ørindum – ella í ørindum fyri løgtingið. Tað kann t. d. verða fundir í Norðurlandaráðnum, í Útnorðurráðnum o. ø., sum hevur beinleiðis við tingarbeiðið at gera.

# Munnligir fyrispurningar komnir fyri at vera

**Ein orsøk til, at tingfundirnir verða fleiri í tali, eru munnligu fyrispurningarnar. Teir eru góðir fyri javnvágina millum løgtingið og landsstýrið, heldur Edmund Joensen, løgtingsformaður**

LØGTINGIÐ
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



Nú tingárið er hálvrunnið, hevur løgtingið hildið 50 fundir. Hetta er heldur meira, enn vanligt er, og vóru í fjør sama tíðarskeið hildnir 36 fundir.

Edmund Joensen, løgtingsformaður, sigur, at fundarvirksemið hjá løgtinginum er økt, m. a. vegna munnligu fyrispurningarnar, sum eru komnir fyri at vera.

Hann vísir á, at andstøðan er sera virkin við munnligum fyrispurningum, og tað heldur hann vera gott.

Hetta er gott fyri javnvágina millum løgtingið og landsstýrið, og er ein sera góður máti hjá løgtingsfólki at fáa innlit í mál, sum landsstýrið arbeiðir við. Men hetta er politikkur, og tí verður kjakið mangan í so drúgvt, heldur Edmund Joensen.

Onkur hevur havt á orði í sambandi við munnligar fyrispurningar, at tingfólk brúka ein triðing av tíðini til spurningin og tveir triðingar til at »skrifta« til at vísa á alt tað góða, tey hava gjørt, og nakað kann vera um tað.

Edmund Joensen vísir á, at munnligu fyrispurningarnir eru komnir í fasta legu og at tingfundurin mikudag seinnapart vanliga verður settur av til hesar fyrispurningar.

Um seinnu hálvu av tingárinum væntar løgtingsformaðurin sær nógvan aktivitet.

Skal eitt nú visión 2015 røkkast, so fer tað at merkjast, tí nógv løggáva skal dagførast, eins og Íslandssáttmálan eisini fer at økja um aktivitetin, heldur løgtingsformaðurin.

Edmund Joensen sigur, at løgtingið hevur royndt at planlagt saman við landsstýrinum, soleiðis at ikki ov nógv mál hópað seg upp framman undan jólum og framman undan seinasta tingfundi um várið. Men hetta hevur ikki riggað nóg væl, sigur hann, tí landsstýrið kemur við alt ov nógvum málum í síðstu løtu, men hann vónar, at hetta verður betri.

## Guðrun í Stóra Pakkhúsi

Hóskvøldið verður stjórnan av Tvøroyri, Guðrun Sólja Jacobsen, aftur at hoyra, síggja og uppliva í Stóra Pakkhúsi í Vági. Tónleikacafé er á skránni, og fer m. a. Gurðun Sólja at upptraðka. Hetta er somuleiðis seinasta tónleikacafé í Stóra Pakkhúsi í ár.

Í Stóra Pakkhúsi er góður møguleiki at hittast til eina hugnaløtu, til eitt prát saman við familju, vinfólki og kenningum.

Húsið er opið frá kl. 21.00.

# Teir »landføstu« hava tað lættari

LØGTINGIÐ
*Eirikur Lindenskov*
eirikur@sosialurin.fo



Í blaðnum í gjár nevndu vit, at Hergeir Nielsen hevur verið burtur ein tingdag, tað var tann 2. desember. Hetta kostaði honum tríggjar tingfundir. Hevði hann hinvegin búð í Havn ella á »fastlandinum«, so hevði hetta verið lættari.

Ferðasambandið hevur við sær, at ein suðuroyartingmaður, sum fer til eitt árligt viðtal við lækna ella tannlækna sín er burturstaddur tríggjar tingfundir. Men ein »landfastur« tingmaður kann hinvegin sita og gapa í tannlæknastólinum hvønn tann einsta fyrrapart allar 365 dagarnar í árinum, og kortini møta á øllum tingfundum sigur Hergeir Nielsen.

